Frá: Árni Gregersen, Nexø argr@tv2bornholm.dk

**TELDUBRÆVIÐ**

Dagur 27.03.01

Til: birgir@sosialurin.fo

Evni: Vikuskifti

# Várið er her

Tað ber ikki til at syngja »Vár við lýggjum vindi« enn, men várið er her.

Seinastu vikurnar hava verið kaldar. Norðanættin hevur bitið í kjálkarnar, tá ið man hevur verið uttandura. Ikki tí kuldastigini hava verið so nógv – tað kaldasta í vetur eru 17 kuldastig eina einstaka nátt – men heldur tí at vindurin hevur verið so mikið nógvur.

Vit kenna tað væl í Føroyum. Tað er ikki altíð kaldast, tá ið kuldastigini eru flest. Ofta kennist tað kaldast tá hann liggur um frostmarkið og vindurin er nógvur.

Annan veturin, eg var á Bornholm, var kalt. Í drúgva tíð vóru 20 kuldastig, men afturfyri var næstan ongin vindur. Kvøldini vóru serliga vøkur – himmalin avtaglaður við blunkandi stjørnum.

Slík kvøld hava eisini verið í vetur, men ikki so mong sum tá. Í vetur hevur tað í størri mun verið vindurin, sum hevur elvt til kuldan. Eitt sindur av kava var herfyri, men onki at tosa um.

Hvussu gongur so veturin á eini oyggj sum Bornholm, sum hvørt einasta summar hevur einar 600.000 – 800.000 ferðafólk?

Jú, her er meira stilt. Tá ið ein fer til handils, er lættari at sleppa framat kassanum, tí tað stórt sæð bert eru tey fastbúgvandi sum eru í handlunum.

Ongin ivi er um, at fyri ein fremmandan er tað keðiligt at koma til Bornholm um veturin. Her hendir so at siga onki, halda tey.

Men soleiðis er tað ikki. Tað hendir nógv, men tað er ikki so alment sum tað, ið hendir um summarið.

Bornholm hevur fimm kommunur við hvør sínum høvuðsbýi, men harumframt eru nógvir smærri býir og samfeløg. Eins og í Føroyum liva hesi samfeløg sítt egna lív, sum tey, ið ikki búgva júst á staðnum, fáa so nógv at vita um: tey spæla sjónleik, spæla tónleik, dart, talv, spæla kort, billiard og hittast annars hjá hvørjum øðrum júst sum í Føroyum. Harumframt er ítrótturin.

Alt hetta virkar sjálvandi eitt sindur keðiligt, um tú sært tað uttanífrá. Men soleiðis er tað eisini í Føroyum. Kemur tú til eina miðalstóra bygd og ongan kennir, so virkar bygdin oftast ómetaliga keðilig. Hevur tú hinvegin samband við tey, sum búgva í bygdini, so lærir tú skjótt, at mangt hendir aftan gardinurnar, tá ið myrkt er uttanfyri og ljós er inni.

Vit hava mangan lyndi til at halda, at har vit ikki sjálvi búgva, har hendir onki. Tað er bert har vit sjálvi eru, at okkurt spennandi hendir. Men soleiðis er tað ikki – onnur duga eisini at hugna sær og stytta sær stundir. Og minst til: hvør hevur síni ítriv!

Páskirnar nærkast, og so koma tey fyrstu ferðafólkini. Tað sæst beinanvegin. Fleiri handlar og matstovur, sum hava ligið í dvala, lata uppaftur. Meira ferð kemur á tann partin av samfelagnum, sum fæst við ferðafólk. Longu nú hevur almenna ferjufelagið, som røkir siglingina til Bornholm, boðað frá, at tey noyðast at seta eykjaferju inn fyri at kunna flyta øll ferðafólkini til oynna um páskirnar.

Á páskum koma fyrstu ferðafólkini, men tað er eitt lítið glopp áðrenn summarferðafólkastreymurin av álvara byrjar. Her siga tey sakkønu, at háárstíðin er átta vikur. Alt gongur í løtuni út uppá at fáa longt lágárstíðina, tí ómøguligt er at flyta og hýsa meira fólki um summarið.

Jú, várið er sanniliga á veg, sjálvt um vit enn hava náttarfrost. Men tað er ljósari – og sólin skínur nú hvønn dag.



Carl Barks í egnari striku frá 1977

**DISNEY OG TEY. Hundrað ár eru liðin, síðani teknarin Carl Barks varð borin í heim. Seinni í ár er eisini hundrað ára dagur Walt Disneys**

# Carl Barks 100

TEKNIRØÐIR

*Birgir Kruse*

Týsdagurin var hundrað ára dagur Carl Barks. Tað er kendi teknarin aftanfyri Dunnald og tey hjá Disney, sum halda til í Dunnuvík.

Teknirøðir hava verið ein lítið virdur partur av bókmentum. Fyrst og fremst tí, at tey, sum gera teknirøðir, ikki hava áhuga í at skriva seg inn í stóru bókmentunarligu traditiónina. Men undantøk eru. Carl Barks er eitt hitt fremsta.

Carl Barks varð føddur í Oregon í 1901 og doyði 99 ára gamal hin 25. august í fjør.

Fram til 1942 hevði Barks teknað og skrivað søgur til 36 Disney teknifilmar. Tá gavst hann og fekk sær hønur.

Framíhjá teknaði hann tó framhaldandi fyri Disney og varð løntur fyri hvørja síðu, hann teknaði. Tilsamans 6.371 síður. Ein rættur free-lancari. Men ongantíð fekk hann part av risa stóru søluni kring allan heimin.

Tað var hetta skeiðið, frá 1943 til 1965, at hann fann uppá fleiri av persónunum, vit kenna úr bløðunum og sum umboða hvør sítt lyndi og gera klassisku Disney søgurnar so spennandi. Hin pengagríski Gírikur McGvagg, hin eydnusami Gullfinnur Gorront, brotsmenninir Búrhundarnir o.s.fr. Ein kann av røttum siga, at hetta tíðarskeiðið vórðu flest øll børn í Vesturheiminum innlimaði í víðagitna dunnubýin, Andeby, ella Dunnuvík, sum staðurin kom at eita í føroysku týðingini, sum Pauli Nielsen gjørdi og Bókadeild Føroya Lærarafelags gav út.

Ummælarar, serliga teir við tokka til teknirøðir, hava lyndi at seta Barks millum fremstu søgusigarar í farnu øld. Hann er bæði skald og skemtari. Hetjan í søgunum er oftast vanlukkuliga syndarlig. Ein lítil dunna við stórum tankum, sum rennir seg í ikki minni trupulleikar, tá stórtøknar ætlanir skulu setast í verk. Ein nútíðar Cervantes, tekur onkur til.

Á hundrað ára degnum eru bløðini um Dunnald og tey halgaði minninum um teknaran Carl Barks. Í vikuni kom eisini ein serlig útgáva við 13 av bestu søgunum hjá Barks. Í Danmark er tað Egmont forlagið, sum gevur út og henda bókin rópast »Carl Barks bedste«.

Hin 5. desember í ár raka vit hundrað ára dag Walt Disneys. Hann doyði hin 15. desember í 1966. Kanska verða viðurskiftini í risafyritøkuni Disney tá tikin upp til eftirmetingar. Tað er tørvur á, skal eg heilsa og siga.

Søgan um Walt Disney er gjørd til íslendskt kvæði. Tað var síðst í 70'unum, tá Þórarinn Eldjárn yrkti og gav út »Disneyrímur«, sum systurin Sigrún myndskrýddi. Onnur útgáva av »Disneyrímum«, sum er til taks á Landsbókasavninum, kom í 1980. Ein frægd at lesa, eisini hjá teimum, sum ikki skilja so væl íslendskt.

Á bókaútsøluni herfyri, rendi eg meg í eina í hesum sambandi áhugaverda danska bók í Bókasøluni í SMS. Hon nevnist »Aschehoughs Biografiske Leksikon«. Men hetta er ikki ein vanlig biografisk leksikon. Hetta er ein bók um 339 kendar persónar, sum aldri hava livað.

Kend fólk skriva um hesar persónar, sum aldri vórðu. Eitt nú skrivar Lone Dybkjær um Dúnhild, ella Andersinu, Søren Vinterberg skrivar um Dunnald og Georg Metz skrivar um Gírikk, ella Joakim von And.




T Ó R S H A V N A R K O M M U N A

## Verkfrøðingur

*Endurlýsing*

Á teknisku deild Tórshavnar kommunu er eitt avloysarastarv sum verkfrøðingur/starvsfólk við tekniskari útbúgving innan heilsu- og umhvørvi leyst at søkja.

**Starvið**
ið er eitt avloysarastarv, er sett til eitt ár, og fevnir um umsiting av heilsu- og umhvørvismálum hjá Tórshavnar kommunu.

**Arbeiðsuppgávur**
umsøkjarin kemur m.a. at arbeiða við:

- Umsiting av ymiskum loyvum
- Luttaka í byggimálsviðgerð við tilknýti til heilsu- og umhvørvismál

Røkja umhvørviseftirlit við teimum uppgávum, ið tekniska deildin umsitir. (Kommunalar kloakkir)

**Kommunan bjóðar**
eitt áhugavert og mennandi starv við nógvum avbjóðingum.

**Setanarviðurskifti**
Starvið verður sett skjótast til ber. Løn sambært sáttmála millum Føroya landsstýri og avvarðandi yrkisfelag.

**Meira fæst at vita**
um starvið við at venda sær til Boða Haraldson, býðarverkfrøðing, ella Marius Müller, tekniska stjóra, tlf. 31 51 60.

**Umsóknir**
saman við upplýsingum um útbúgving, royndir og møguligum viðmælum skulu vera Tórshavnar kommunu, postrúm 32, 110 Tórshavn, í hendi í seinasta lagi 15. apríl 2001. Viðmerk á umsóknina "starv á teknisku deild til heilsu- og umhvørvismál"

S N A R S K I V A N

Søkt verður eftir

**arbeiðsmonnum og handverkarum**

til arbeiði í Runavík.

J & K

**Tlf. 210558 & 315060**

**Sjúkrasystraskúli Føroya**
Fo 100 Tórshavn

## Sjúkrasystraskúli Føroya

Nýggjur flokkur av sjúkrasystralesandi byrjar **3. september 2001.**

Vilt tú hava eina útbúgving, har tú:

- fært stórar avbjóðingar, nógvar valmøguleikar og brúk fyri tínum persónligu eginleikum og hollari ástøðiligari vitan.
- hevur nógvar starvsmøguleikar innan alla heilsutænastu og møguleikar fyri at arbeiða uttanlands, bæði hjá humaniterum stovnum og øðrum ótraditionellum støðum.

**Treytirnar fyri upptøku eru:**

- at umsøkjarin hevur lokið students-, HF-, HH-, HTX-progv ella líknandi prógv
- skeið í fyrstuhjálp, áðrenn 1. útbúgvingarpartur er liðugur
  og
  annaðhvørt 8 mðr. arbeiðsroyndir
  og/ella
- uttanlandsferðir og -uppihald
- háskúlauppihald ella líknandi
- aðrar ikki gjøgnumførdar útbúgvingar

Umsóknarbløð og nærri upplýsingar fáast við at venda sær til Sjúkrasystraskúla Føroya, Eirargarður 14 B, tlf. 313540, lokal 435/436.

**Umsóknarfreist hósdag 31. mai 2001.**

Øll, ið ynskja fleiri upplýsing og ætla sær at søkja inn á Sjúkrasystraskúlan, verða boðin til ein kunnandi fund antin **2. mai 2001 kl. 19.30** ella **9. mai 2001 kl. 19.30.**

**Tilmelding á tlf. 316027 lokal 435/436 millum kl. 9 og 12.**

## Frá Heimahjálparafelag Føroya!

Ársaðalfundur felagsins verður leygardagin tann 21. apríl kl.13.00 í Pálsstovu í Havn.

Skrá sambært lógum felagsins.

**Nevndin**

## Servitrisa/ Tænari



Til okkara matstovu verður hervið søkt eftir servitrisu/tænara at byrja 1. apríl.

***Restaurant***

MARCO POLO

**Tlf. 313430**

## Tiltøk í apríl 2001

**Íslendska framsýningin hjá Magnus Kjartanssyni er í húsinum til og við 10. apríl**

**Sunnudagur 01. kl. 13.00**
POSTVERK FØROYA 25 ÁR. Framsýning

**Mánadagur 02. kl. 19.30**
»Klipp« Filmsfelag Norðurlandahúsins. Sýndur verður føroyski filmurin »Bye-Bye-Blue Bird«, sum Katrin Ottarsdóttir hevur gjørt. Filmurin er frá 1999

**Hósdagur 05. kl. 19.30**
Nordisk Mestermøde i Dragspel

**Leygardagur 07. kl. 11.00**
Grindamannafelagið heldur fund

**Húsið er stongt frá skírisdegi 12. apríl til 2. páskadag 16. apríl**

**Leygardagur 21. kl. 20.00**
PRIX FØROYAR - FINALA kl. 20:00
Týsdagur 24. Bókmentakvøld
(Oddfríður Rasmussen) kl. 19:30

**Mikudagur 25. kl. 14–18**
Flaggdagur. Húsið opið sum sunnudag

**Hósdagur 26. kl. 19.30**
»Orfeus«, Musikkfelag Norðurlandahúsins, konsert
Á skránni: Liederkvøld v/Annu Mariu Pammer, Eysturríki, sopran og Paul Gulda, Eysturríki, klaver

***Broytingar í skránni kunnu koma fyri.***
***Høvi er at keypa te, kaffi, sodavatn, øl, breyð, køkur o.a. í kaffistovuni.***
***Húsið er opið gerandisdagar kl. 10.00 -18.00 og sunnudagar kl. 14.00-18.00.***
***Kaffistovan er opin, tá ið húsið er opið.***

**NORÐURLANDAHÚSIÐ Í FØROYUM**
Telefon nr. 317900. Telefax nr. 319790
e-mail:nlh@nlh.fo · http://www.nlh.fo
Tekstvarp í SvF frá síðu 650

## *Nýggj høli*



*Vit flyta niðurundir, í sama bygningi »sama inngongd sum Radioverkstaðurin«*

Húðrøktarstovan
BEAUTY LINE
v/ Elin Madsen
N. Finsensgøta 16,kj • 100 Tórshavn • Tel. 320 321